FISKIMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Postboks 208
110 Tórshavn

Stjórnarskrivstovan
23. apríl 2021
Mál: 21/06685-2
(at tilskila í svari)

Svar til § 52 a fyrispurning nr. 52-118/2020 frá Beintu Løwe Jacobsen, løgtingsmanni

Spurningar um Veðurstovu Føroya:

1. Nær er endalig avgerð tikin um at staðseta Veðurstovu Føroya í Havn?
2. Er ætlanin at leggja Veðurstovu Føroya aðrastaðni, antin í Klaksvík ella á Flogvøllinum

Svar:

Til nr. 1.
Endalig støða er ikki tikin um at staðseta Veðurstovu Føroya í Havn.

Í sambandi við staðseting, so loyvi eg mær at vísa til tíðindaskriv, ið er sent út í sambandi við veðurtænastuna. Í nevnda skrivi stendur millum annað, at Veðurstøðin við Hoyvíksvegin verður í byrjanini høvuðsdeild hjá Veðurstovu Føroya.

Í sama skrivi er ásett, at í sambandi við tilbúgving verður kannað um møguleikan at gera vaktararbeiðspláss á viðkomandi støðum, so veðurfrøðingur í ávísum føri kann arbeiða har.

Til nr. 2.
Ætlanin er at staðseta Veðurstovu Føroya á flogvøllinum í Vágum.

Eg skal í hesum sambandi leggja áherðslu á, at ætlanin er ikki, at flogvøllurin verður einasta staðið, ið nýtt verður í sambandi við veðurtænastu.

Í hesum sambandi skal eg nevna, at vaktararbeiðspláss og líknandi kunnu staðsetast á øðrum plássum kring landið, tað veri seg í verandi hølum hjá Veðurstøðini í Tórshavn eins og í øðrum økjum kring landið.

Avgerð um eina spjadda staðseting skal sjálvandi grundast á tørv og onnur viðurskifti, ið serkunnleikin vísir á. Serkunnleikin í hesum føri eru veðurfrøðingar ella onnur, ið hava arbeitt við verkætlanini og/ella verða knýtt at tænastuni í framtíðini.

Jacob Vestergaard
landsstýrismaður

Ministry of Fisheries

Yviri við Strond 15 • P.O. Box 347 • FO-110 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. (+298) 35 30 30 • Fax (+298) 35 30 35 • fisk@fisk.fo • www.fisk.fo